# Manglar grundgeving fyri at flyta Stuðulsstovnin til Runavíkar

**Tað hongur ikki saman, tá Torbjørn Jacobsen førir fram, at avgerðin um at flyta Stuðulsstovnin til Runavíkar langt síðan er tikin, og at Annlis Bjarkhamar tískil ikki hevur orsøk at viðgera málið av nýggjum. Tað metir fyrrverandi landsstýrismaðurin í mentamálum, Signar á Brúnni, sum vísir á, at tað finst als eingin grundgeving fyri at flyta stovnin til Runavíkar. Harumframt fylgdi Torbjørn Jacobsen ikki politisku avgerðini hjá undanmanni sínum, tá hann tók avgerð um at flyta Almanna- og Heilsuskúlan til Suðuroynna, vísir Signar á Brúnni á**

ØKISMENNING
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Tað er fallið Signar á Brúnni, fyrrverandi landsstýrismanni í mentamálum, fyri bróstið, at ein annar fyrrverandi landsstýrismaður í mentamálum, Torbjørn Jacobsen, í síðstu viku í Sosialinum heitti á sitandi landsstýrismann í mentamálum, Annlis Bjarkhamar, um at syrgja fyri at politiska avgerðin um at flyta Stuðulsstovnin til Runavíkar verður fylgd.

Tað var Torbjørn Jacobsen, sum ein av sínum síðstu arbeiðsdøgum í Mentamálastýrinum tók avgerð um at flyta Stuðulsstovnin til Runavíkar, og hann ætlar sær eisini at tryggja, at stovnurin verður fluttur til Runavíkar.

Signar á Brúnni heldur tað vera heilt burturvið, tá Torbjørn Jacobsen nú heldur fast við, at stovnurin skal flytast til Runavikar.



*Tað finst eingin saklig grundgeving fyri at stuðulsstovnurin skal liggja í Runavík, metir Signar á Brúnni, fyrrverandi landsstýrismaður í mentamálum*

*Savnsmynd*

- Tað finnist eingin saklig grundgeving fyri at flyta Stuðulsstovnin til Runavíkar, og tað er heldur einki, sum undirbyggir avgerðina hjá Torbjørn Jacobsen, metir Signar á Brúnni. Hann leggur afturat, at ongar kanningar eru gjørdar, sum vísa, at skilabest er at flyta stovnin til Runavíkar.

Tí heldur hann lítið um, at Torbjørn Jacobsen roynir at ávirka landsstýrismannin í mentamálum, Annlis Bjarkhamar, áðrenn hon í næstum skal taka endaliga avgerð um, hvar Stuðulsstovnurin skal liggja í framtíðini. Hann tekur tískil undir við Annils Bjarkhamar, tá hon førir fram, at neyðugt er at viðgera framtíðar støðuna hjá Stuðulstovninum av nýggjum, áðrenn endalig støða verður tikin í málinum.

### Gjørdi sjálvur móti politiska viljanum

Signar á Brúnni heldur at tað hongur illa saman, tá Torbjørn Jacobsen í síðstu viku heitti á Annlis Bjarkhamar um at fylgja politisku avgerðini hjá undanmanni hennara um at flyta stovnin til Runavíkar. Signar á Brúnni vísir á, at Torbjørn Jacobsen, tá hann gjørdist landsstýrismaður í mentamálum, sjálvur broytti eina politiska avgerð hjá undanmanni sínum, og eisini í hesum føri uttan nakra sakliga grundgeving.

Tað sum Signar á Brúnni sipar til, er avgerðin hjá Torbjørn Jacobsen um at nýggi Almanna- og Heilsuskúlin skuldi liggja í Suðuroynni. Signar á Brúnni vísir á, at tá var eisini ein politisk avgerð tikin um at skúlin skuldi liggja í Havn, grundgevingin fyri hesum var eitt nú, at so bar til at samstarva við Sjúkrasystraskúlan.

Tí heldur Signar á Brúnni tað vera beinleiðis í andsøgn, tá Torbjørn Jacobsen nú heitir á Annlis Bjarkhamar um at fylgja politisku avgerðini hjá undanmanni sínum og flyta Stuðulsstovnin til Runavíkar. Hann mælir har aftur ímóti lansstýrismanninum til at kanna møguleikarnar fyri, hvar størsta nyttan fæst burtur úr Stuðulsstovninum, áðrenn hon tekur avgerð um, hvar stovnurin skal liggja í framtíðini.

Signar á Brúnni tekur undir við at flyta almennar stovnar úr høvuðsstaðnum. Men tá tað verður gjørt, eigur hædd at takast fyri, hvar stovnurin best kann røkja sína uppgávu, og hvar stovnurin best tænir økinum, hann verður fluttur til. Í samband við at flyta Stuðulsstovnin úr høvuðsstaðnum vísir Signar á Brúnni á, at møguleikin fyri at flyta hann inn á Kambsdal eigur eisini at kannast. Serliga tá havt verður í huga, at har frammanundan eru tveir miðnámsskúlar og eitt skúlaumhvørvi við næmingum, lærarum og lestrarvegleiðarum.

# Eg framdi økismenning í verki

**Torbjørn Jacobsen heldur lítið um atfinningarnar hjá Signar á Brúnni, bæði í samband við avgerðina hjá honum at flyta Stuðulsstovnin til Runavíkar og avgerðina at leggja Almanna- og Heilsuskúlan í Suðuroynni. Hann vísir á, at seinasta samgonga setti sær fyri at menna útjaðaran, og tað var tað, sum hann framdi í verki**

ØKISMENNING
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Tingmaðurin og fyrrverandi landsstýrismaðurin Torbjørn Jacobsen heldur lítið um skuldsetingarnar, sum Signar á Brúnni, fyrrverandi ting- og landsstýrismaður førir fram ímóti sær.

Signar á Brúnni førir millum annað fram, at tað finnast ongar sakligar grundgevingar fyri at flyta Stuðulsstovnin til Runavíkar, og hann heldur tí at tað er rætt av Annlis Bjarkhamar at viðgera málið av nýggjum, áðrenn hon tekur støðu til, hvat skal vera av Stuðulsstovninum.

Men hesum er Torbjørn Jacobsen als ikki samdur í. Hann vísir á, at undanfarna samgonga hevði sær fyri at menna útjaðaran, og tað var júst tað, hann gjørdi.

- Stuðulsstovnurin helt til, og húsast enn, í hølunum hjá Mentamálastýrinum/-ráðnum, og tí kenni eg hann frá míni tíð sum landsstýrismaður. Talan er um ein lítlan stovn, har at kalla alt samskifti við viðskiftafólk fer fram umvegis telefonina ella telduna, og tí kemur einki fólk á gátt har. So fyri tað kundi stovnurin ligið í Mykinesi, sigur Torbjørn Jacobsen. Hann vísir á, at eingin almennur stovnur er fluttur úr Havn inn í Eysturoynna í nógv ár, og tí gjørdi hann av at flyta stovnin inn har. At tað júst gjørdist Runavík komst einamest av, at Runavík er at meta sum høvuðsstaður í Eysturoynni, leggur Torbjørn Jacobsen afturat. Torbjørn Jacobsen hevur higartil hildið fast um, at Stuðulsstovnurin skal flytast til Runavíkan, men hann sigur nú, at kemur landsstýrismaðurin í mentamálum til ta niðurstøðu, at tað bara ber til at leggja Stuðulsstovnin á eitt annað stað í Eysturoynni enn í Runavík, so fer hann ikki at seta seg upp ímóti tí.



*Tað eru bara sterkar, politiskar avgerðir, sum flyta almennar stovnar úr høvuðsstaðnum, sigur Torbjørn Jacobsen*

*Savnsmynd*

- Týdningarmiklast er at stovnurin verður fluttur úr Havn inn í Eysturoynna, sigur Torbjørn Jacobsen, sum ikki heldur, at grundgevingar ikki vóru fyri avgerðini at flyta stovnin.

- Setur tú fólk at kanna, hvørt tað er rættast at flyta ein almennan stovn úr høvuðsstaðnum, so veitst tú frammanundan, at niðurstøðan verður, at stovnurin hevur tað best í Havn. Tí er neyðugt at taka politiskar avgerðir, sum tú torir at standa við, sigur Torbjørn Jacobsen.

### Signar hevði ikki politiskan rygg

Í august 2000 boðaði Torbjørn Jacobsen, sum tá var landsstýrismaður, frá, at hann hevði tikið avgerð um at nýggi Almanna- og Heilsuskúlin skuldi liggja í Suðuroynni. Hetta hóast undanmaður hansara, Signar á Brúnni, frammanundan hevði gjørt av at skúlin skuldi liggja í Havn. Torbjørn Jacobsen sigur í dag, at hann broytti avgerðina hjá Signar á Brúnni, tí hevði Almanna- og Heilsuskúlin verið lagdur í Havn, so hevði tað verið beinleiðis í stríð við málsetningin hjá samgonguni um at menna útjaðaran.

- Ein kann spyrja seg sjálvan, um tað var ein politisk avgerð, sum Signar á Brúnni tók, tá hann gjørdi av at nýggi skúlin skuldi liggja í Havn, ella tað var politiskur veikleiki. Eg haldi heldur, at talan var um, at Signar boygnaði undan nógva trýstinum, sum altíð liggur á politikarar um at alt skal liggja í høvuðsstaðnum, sigur Torbjørn Jacobsen. Hann leggur afturat, at tað var ikki uttan svørðsløg, bæði við politikarar og ikki minst við fólk í almennu umsitingini, at tað eydnaðist honum at fáa skúlan lagdan í Suðuroynni.



Fólkakirkjan viðgjørd á tingi:

# Ósamd um framferðarháttin

**Tað, sum ikki skuldi gerast parapolitiskt, gjørdist einki annað enn partapolitikst, tá fyrispurningur um fólkakirkjuna var í tinginum týsdagin. Stór ósemja er um framferðarháttin í sambandi við yvirtøkuna av fólkakirkjuni**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Tað kundi valla verið betri lagt til rættist; ein fyrispurningur um kirkjuni, nú málið er vorðið størsta málið her á landi.

Lisbeth L. Petersen, tingkvinna fyri Sambandsflokkin, setti fram fyrispurning til Annlis Bjarkhamar, landsstýriskvinnu, um yvirtøkuna av kirkjuni.

Fyrispurningurin frá Lisbeth L. Petersen var soljóðandi: Verður álitið um fólkakirkjuna, sum varð handað landsstýrismanninum í mentamálum seinasta heyst, lagt fyri Løgtingið til viðgerðar?



*Annlis Bjarkhamar fekk sína sak fyri í tinginum týsdagin, tá stór mótstøða vísti seg at vera móti hennara yvirtøkuleisti*

Ætlar landsstýrismaðurin at taka stig til, at allir avvarðandi myndugleikar verða tiknir við í arbeiðið at fyrireika yvirtøkuna av fólkakirkjuni?

Lisbeth L. Petersen vísti á, at tað í samgonguskjalinum stendur skrivað, at allir yvirtøka skuldi fremjast í samstarvi við allar partar. Hon segði, at Sambandsflokkurin ikki hevði nakað ímóti at yvirtaka fólkakirkjuna, tá vit (føroyska heimastýri) vóru klár til tað.

Annlis Bjarkhamar vísti í sínum svari á, at arbeitt hevur verið við yvirtøkuni av fólkakirkjuni í longri tíð.

– Mentamálráðið fekk handað álit um yvirtøku av fólkakirkjuni frá arbeiðsbólki 23. august 2001. Álitið var sent til viðkomandi áhugabólkar. Fleiri viðmerkingar vóru til álitið, men í høvuðsheitum var talan um tríggjar, nevniliga bygnaðin, fíggingina og ynski kirkjumyndugleikanna í fyrireikingunum í smb. við yvirtøkuna. Álitið og viðmerkingar í smb. við hoyringina er viðgjørt í Mentamálaráðnum. Landsstýrismaðurin hevur avgjørt ikki beinleiðis at seta álitið (lógaruppskotið) í verk, men heldur at nýta partar úr álitinum og gera neyðugar tillagingar, sum komu fram í smb. við hoyringina. Hetta verður gjørt í samráð við teir partar, ið varða av fólkakirkjuni.

Úrslitið av hesum arbeiði verður lagt fyri Løgtingið at taka støðu til, so skjótt sum tað er liðugt, seðgi hon í svari sínum.

Annlis Bjarkhamar helt, at mentamálaráðið hevði ráðført seg við allar partar.

Sum er, hevur Mentamálaráðið samskift við viðkomandi myndugleikar innan fólkakirkjuna. Ætlanin er, at samskifta við teir aftur, og so vítt sum gjørligt helst eisini fyri næsta samráðingarfund, segði Annlis Bjarkhamar.

Lisbeth L. Petersen var – sum roknast kundi við – als ikki nøgd við svarið frá Annlis Bjarkhamar. Lisbeth L. Petersen kennir tað ikki sum um, at allir neyðugir partar sleppa til orðanna í sambandi við yvirtøkuna.

Annlis Bjarkhamar vísti á, at ein yvirtøka vil geva neyðugu amboðini til skipanina av einari føroyskari fólkakirkju í framtíðini. Eftir hennara skuldi yvirtøkan koma fyrst av øllum, men hesum var Lisbeth L. Petersen alt annað enn samd við henni í.

### Framferðarhátturin

Eftir at fyrispurningurin var svaraður, kom rættiliga glið á orðaskifti. Nógvir tingmenn høvdu hug at taka til orðanna. Málið hevur eftir øllum at døma fest røtur hjá fleiri.

Kjakið snúði seg serliga um framferðarháttin í sambandi við yvirtøkuna. Bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava víst á, at teir sum so eru fyri at yvirtaka fólkakirkjuna.

Annlis Bjarkhamar segði ikki duga at síggja, hvat partarnir vóru so ósamdir um.

Hendrik Old, tingmaður fyri Javnaðarflokkin, vísti – eins og Lisbeth L. Petersen – á, at saknur var á einum kjaki um evnið, og hann helt tað vera ógvuliga løgið at fremja yvirtøkuna fyrst og smíða lógirnar aftaná. Hetta sama við framferðarháttinum var eisini tað, ið merkti orðaskifti almikið.

Nakrir politikarar gjørdu nógv burturúr, at talan ikki skuldi gerast eitt partapolitiskt mál. Ein teirra var Tórbjørn Jacobsen, sum segði, at málið fyri alt í verðini ikki mátti gerast partapolitiskt.

Hann varð seinni noyddur at draga eitt sindur í land. Sum heild gjørdist prátið ikki nógv annað enn partapolitiskt.

Kári P. Højgaard um yvirtøku av fólkakirkjuni:

# – Ikki í tráð við samgonguskjalið

**Samgongulimurin Kári P. Højgaard vísti í tinginum týsdagin stóra misnøgd við framferðarháttin í sambandi við yvirtøkuna av fólkakirkjuni**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Fyrispurningurin hjá Lisbeth L. Petersen til Annlis Bjarkhamar setti veruliga gongd á eitt orðaskifti í tinginum týsdagin. Týðuligt er, at fleiri tingmenn sakni møguleikan at kjakast um evnið, og hetta gav eisini at bíta í drúgva orðaskiftinum.

Kári P. Højgaard, tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin og limur í samgonguni, segði seg ikki vera nøgdan við framferðarháttin í sambandi við ætlaðu yvirtøkuna av fólkakirkjuni.

– Eg eri keddur av, at málið er komið soleiðis fram, segði Kári P. Højgaard av tingsins røðarapalli týsdagin. Hann sipaði til, at hann umvegis fjølmiðlarnar um vikuskifitið varð kunnaður um gongdina.



*Kári P. Højgaard heldur ikki, at ætlaða yvirtøkan er í tráð við samgonguskjali*

Hann fór eisini so langt sum at siga, at ætlaða yvirtøkan ikki er í tráð við samgonguskjalið, sum Kári P. Højgaard fyri Sjálvstýrisflokkin skrivaði undir 6. juni ár.

Hann vildi fegin sláa fast, at hann er hundrað prosent fyri at yvirtaka fólkakirkjuna, men framferðarhátturin hóvaði ikki honum.

– Hetta er eitt óneyðugt signal. Vit skulu taka øll við í sambandi við yvirtøkuna, segði Kári P. Højgaard.

»Orðingin um yvirtøku av fólkakirkjuni er soljóðandi í samgonguskjalinum: Fólkakirkjan verður í samstarvi við allar partar í føroysku kirkjuni yvirtikin, so hon kann halda fram í verandi bygnaði, og meirútreiðslur í sambandi við yvirtøku verða goldnar av landskassanum.«

Tað er hendan orðingin, ið tingmaðurin og samgongulimurin Kári P. Højgaard ikki heldur verður fylgd.

Løgmaður segði í løgmansrøðu sínari á ólavsøku, at fólkakirkjan verður í samstarvi við allar partar í føroysku kirkjuni yvirtikin.

– Vit skulu taka málið frá rætta endanum, segði Kári P. Højgaard eisini í tinginum týsdagin.

# Prestar á skeið



*Mánadagin og týsdagin vóru føroyski prestar á skeiði í Dansistovuni í Norðurlandahúsinum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Mánadagin og týsdagin vóru føroyskir prestar á skeiði í Norðurlandahúsinum. Talan er um eitt skeiði, ið Teologisk Pædagogisk Center skipar fyri í samstarvi við Føroya Stiftsstjórn.

Marjun Bæk, sóknarprestur í Norðurstreymoyar prestagjaldi, hevur saman við Ingu Poulsen Dam skipað fyri skeiðini fyri Stiftsstjórnina. Hon greiðir frá, at prestarnir árliga eru á skeiði. Evnini eru ymisk ár um ár. Á hesum skeiðinum verður tosað um so ymisk evni sum Skúla- og kirkjusamstarv og sálmarithøvundin Jacob Knudsen.

Einir fimtan prestar vóru á skeiðinum, sum varð hildið í Norðurlandahúsinum.

Fyrilestrarhaldarar frá Teologisk Pædagogisk Center vóru Finn Rosenberg og Marie Monrad. Finn Rosenberg hevði sunnudagin gudstænastu í Kirkjubø. Tey fara eisini at halda fyrilestrar fyri lærarum og læraralesandi.

**-HR**